# Karsten Hansen: Lærararnir vilja ikki samráðast longur

*Tey, sum stuðla Lærarafelagnum, stuðla einum fakfelagi í ikki at vilja samráðast og tað er ógvuliga harmiligt, sigur Karsten Hansen, sum vísir aftur, at løgtingið skal leggja seg út í verkfallið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Løgtingið skal ikki leggja seg út í verkfallið hjá lærarunun.

Tað støðu hevur Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hóast arbeiðssteðgurin í fólkaskúlanum nú hevur vart ein heilan mánaða.

Hann sigur, at Lærararnir hava samráðst seg til ein verkfalsrætt og tann rættin skulu vit virða.

– Tað ber ikki til, at Løgtingið nú skal taka hendan rættin frá felagnum aftur, „bara“ tí at verkfallið er longri, enn vit vilja, sigur Karsten Hansen.

Hann harmast um støðuna, sum hevur tikið seg upp.

Men hjá honum er ongin ivi um, at tað er Lærarafelagið, sum hevur bóltin og eigur at taka stig til samráðingar.

Landsstýrismaðurin sigur, at beinanvegin, semingsroyndirnar slitnaðu fyrstu ferð, spurdu semingsmenninir, um partarnir vóru sinnaðir at halda fram.

– Vit søgdu ja, Lærarafelagið segði nei.

–Síðani hava tvey uppskot ligið frammi um, hvussu vit sleppa víðari við samráðingunum, men báðu ferðina søgdu lærararnir nei og vit søgdu ja.

– So tá ið bæði skúlabørn, foreldur, og onnur, siga, at tey stuðla lærarunum, eiga tey at gera sær greitt, at tey stuðla einum felagi í ikki at vilja samráðast, leggur fíggjarmálaráðharrin afturat.

– Men at nokta fyri at samráðast, er at taka verkfalsrættin ov bókstaviliga, sigur hann.

### Ikki givið upp

Men Karsten Hansen leggur afturat, at tey hava ikki givið upp og at tey royna hvønn dag at finna nýggjar vinklar í málinum so at samráðingarnar kunnu verða tiknar upp aftur.

Men hann leggur dent á, at samráðingarnar eru við fíggjarmálastýrið og tað er ongin ósemja við Undirvísingar- og Mentamálastýrið um tað.

–Men so leingi Lærarafelagið ikki vil samráðast, fáa vit onki gjørt.

– Tað, sum er hent í hesum samráðingunum, er , at Lærarafelagið hevur tikið tað sum sína uppgávu at gera av fyri løgtingið, hvussu nógv fólkaskúlalógin skal kosta og, hvussu hon skal setast í verk.

– Tað er at fara útum sínar heimildir og tað kann fáa avleiðingar fyri onnur øki í samfelagnum, sum vit kunnu hugsa okkum til.

– Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hvørki hevur, ella skal hava heimild til at áleggja løgtinginum til at seta eina ávísa upphædd av til ymisk endamál.

– Tað er at flyta lóggevandi valdið úr tinginum og tað er at máa støðið undan fólkaræðinum.

Landsstýrismaðurin sigur, at lærararnir fáa løn fyri fulla tíð. So er bara spurningurin, hva vit fylla í hesa arbeiðstíðina.

Hann sigur, at hann dugir ikki at hugsa sær nakran annan stovn, har tey leggja arbeiðið niður, tí at løgtingið hevur álagt teimum fleiri uppgávur, uttan at tey halda, at tann neyðuga játtanin fylgir við, tí øll gera, tað tey kunnu innanfyri teir karmar, sum eru, og so kunnu tey ikki gera meir.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum heldur, at tað, sum skal til, fyri at fáa gongd á, er ein spurningur um vilja.

# Høgni Hoydal: Eg eri tilreiðar at gera mítt

*– Tað er ein misskilјing, at eg vísi ósemjuna í skúlanum frá mær. Men samráðingarnar eru við fíggjarmálastýrið, sigur landsstýrismaðurin í skúlamálum*



*Nú er lære raverkfallið farið inn í fimtu viku, men enn røkist onki fyri eini semju. Høgni Hoydal er sinnaður til at viðgera, hvat nýggja fólkaskúlalógin ber í sær. Men tað er ein politiskur spurningur, sum ikki kann tengjast upp í sáttmálasamráðingarnar, sigur hann*

ÁKI BERTHOLDSEN

– Eg bíði bara, inntil samráðingarnar verða tiknar upp aftur.

Høgni Hoydal, Landsstýrismaður í Skúlamálum sigur, at tað er ein misskilјing, tá ið tað verður ført fram, at hann vísir ósemjuni í fólkaskúlanum frá sær.

Hann sigur, at í farnu viku fekk hann ein fyrispurning frá Lærarafelagnum um ein fund.

Men hann hevur svarað felagnum aftur, at hann kann ikki koma á fund, fyrrenn samráðingarnar verða tiknar uppaftur

– Tað er okkara fremsta endamál at fáa gongd aftur á samráðingarnar, so tað vóna vit, verður skjótt.

Men tað skilst á Landsstýrismanninum, at hann heldur, at samráðingarnar eru á skeivum grundarlag.

Hesar samráðingarnar eru í tveimum pørtum.

– Í fyrra lagi er talan um sáttmálasamráðingar um løn og onnur starvsviðurskifti. Í tí sambandinum hevur Undirvísingar- og Mentamálastýrið sjálvsagt verið upp í, tí hvat starvsviðurskiftum viðvíkur, er tað í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, at serfrøðin er.

Men Høgni Hoydal sigur, at vandin er, at Lærarafelagið roynir at gera ein sáttmála, sum snýr seg um viðurskifti í sjálvari fólkaskúlalógina. Og tað er hetta, sum ósemjan fyri ein stóran part snýr seg um.

– Men hetta er ein politiskur spurningur, tí í hesum sambandi er landsstýrismaðurin bara bundin at Løgtinginum og tí ber tað ikki til at viðgera fólkaskúlalógina í sáttmálasamráðingum.

Høgni Hoydal sigur, at hann hevur onki ímóti at viðgerða spurningin um nýggju fólkaskúlalógina, men tað er eitt mál, sum má takast upp í løgtinginum og tað kann ikki bindast í einum sáttmála við eitt fakfelag. Tað ber nevniliga ikki til at binda seg í einum sáttmála til, hvussu skjótt ymsir partar í fólkaskúlalógin skulu koma at virka.

*Men, hvussu kanst tú skilja tey bæði sundur, tí sáttmálasamráðingar eru ikki bara um løn, tær eru eisini um onnur starvsviðurskifti.*

– Ja, og í samráðingunum ber tað sjálvsagt altíð til at tosa um, hvørja arbeiðsbyrðu lærararnir hava havt, og hvat, teir hava fingið afturat.

– Men vit kunnu ikki binda okkum mótvegis einum fakfelag til, hvussu og nær fólkaskúlalógin skal fáast at virka, tí tað er ein tilgongd, sum kemur at ganga yvir fleiri ár.

*Nú er tað rættiliga stórur munur á, tí, sum Lærarafelagið sigur er arbeiðstíðin hjá lærarunum og tað roknistykkið, sum Fíggjarmálastýrið hevur gjørt um arbeiðstíðina hjá lærarunum. Hvussu ber tað til at koma víðari, tá ið partarnir ikki so frægt kunnu semjast um, hvussu nógv lærarar hava arbeitt og, hvussu nógv, teir arbeiða nú?*

– Ja, tað er ein trupulleiki, sum vit hava roynt at loyst í ymsum bólkum. Hetta er ein spurningur, sum vit mugu verða samd um. Men tað er ein spurningur, sum vit mugu finna útav í samráðingunum.

Høgni Hoydal sigur, at tað, sum tað nú snýr seg um, er, at fáa partarnar aftur til samráðingarborðið.

– Vit mugu seta nøkur punkt upp og so samráðast um tey, eitt og eitt, til vit eru liðug.

Men hann endurtekur tað, sum hann áður hevur sagt, at tað er neyðugt at skilja samráðingarnar sundur.

– Tað er ongin ivi um, at vit hava ímóti at viðgera tað, sum hevur við Undirvísingar- og Mentamálastýrið at gera.

–Men annars eru samráðingarnar formliga ímillum Lærarafelagið og Fíggjarmálastýrið.

– Og tað skuldi ikki verið nakar trupulleiki at býtt tær uppgávurnar sundur, so at hvør tók sær av sínum.

Høgni Hoydal sigur, at hetta er eisini ein spurningur um at endurvinna tað álitið, sum eigur at vera ímillum landsins myndugleikar og fakfeløgini.



## Støðan í fólkaskúlanum

# Samgonguumboðini mugu spæla greitt út

*Bjarni Djurholm metir, at nú mugu landsstýrismenninir í fíggjarmálum og skúlamálum í felag spæla greitt út*

DAGFINN OLSEN

Sáttmálasettir fólkaskúlalærarar hava nú verið raktir av arbeiðssteðgi í 4 vikur og einki røkist fyri, at ein loysn er fyri framman.

Eftir at Signar á Brúnni legði frá sær sum landsstýrismaður, røkir Høgni Hoydal skúlamál, men hann hevur víst á, at Fíggjarmálastýrið er mótpartur hjá Føroya Lærarafelag. Har má trupulleikin avgreiðast her og nú, so kann tosast um lógina seinni, men hetta góðtekur Føroya Lærarafelag ikki.

### Felags útspæl

Bjarni Djurholm úr fólkaflokkinum heldur, at nú mugu Fíggjarmálastýrið og Undirvísingar- og Mentamálastýrið í felag greitt spæla út, hvat hesi vilja.

Hann metir ikki, at samgongan kann liva leingi afturat við støðuni, sum hon er nú.

– Hetta er ein sera óheppin støða. Samgonguumboðini mugu nú í felag greitt spæla út. Eisini so Lærarafelagið veit, at teir kunnu ikki spæla uppá tveir partar, sigur Bjarni og vísir á, at vandi er fyri, at tvístøðan druknar í tosinum um normeringar.

Føroya Lærarafelag hevur roynt at fáa fund við Høgna Hoydal, men hesin fundur hevur ikki verið enn.

Bjarni Djurholm metir, at Høgni Hoydal eigur at gera greitt, hvussu hann ætlar at skipa nýggju lógina, so tað er í tráð við tað, ið Fíggjarmálastýrið ætlar.

### Mugu tæna somu søk

Bjarni Djurholmm minnir á, at nýggja lógin í grundini hvørki er dýrarai ella bíligari, enn hin gamla lógin.

Men sparingar vóru framdar í gomlu lógini.

– Gamla lógin varð amputerað. Nýggja lógin varð sett í gildi sum en karmur. Hon skuldi setast í gildi yvir eini 4 - 5 ár, minnir Bjarni Djurholm á.

Hann sær onga einfalda loysn á ósemjuni millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag, men Bjarni Djurholm metir avgjørt, at Fíggjarmálastýrið og Undirvísngarmyndugleikarnir mugu tæna somu søk.



*Bjarni Djurholm metir, at nú mugu Fíggjarmálastyrið og Undirvísingar- og Mentamálastýrið koma við felags útspæli viðvíkjandi arbeiðsósemjuni í fólkaskúlanum*

# Smyrsl og skomm

*Katrin Dahl Jakobsen metir, at so leingi nýggja fólkaskúlalógin ikki virkar, er lógin bert smyrsl. Hon heldur verandi støðu vera skomm og eina støðu, ið ikki átti at komið fyri*

DAGFINN OLSEN

Katrin Dahl Jakobsen úr Javnaðarflokkinum heldur, at lítil vón er at hóma í arbeiðsósemjuni, ið hevur lagt fólkaskúlan nærum lamnan í 4 vikur.

Hon heldur vera løgið, at nýggi landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum ikki vil hitta Føroya Lærarafelag.

– Slíkt kann ikki góðtakast. Støðan, sum er nú, átti ikki at komið fyri. Hetta er skomm. Hetta er úrslit av, at ein ikki í sínari tíð fyrireikaði seg, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

- Nýggja fólkaskúlalógin er bert smyrsl, sminka, um lógin ikki virkar, vísir Katrin Dahl Jakobsen á.

Hon vísir á avtaluna millum partarnar, tá teir í fjør heyst samráddust. Tá skuldu trupulleikarnir takast upp aftur við samráðingarborðið nú.

– Hetta er ikki bert ein lønarspurningur, sum tað verður gjørt til. At myndugleikarnir soleiðis ger hetta til ein lønarspurning er at sláa hondina av Føroya Lærarafelag, sigur Katrin Dahl Jakobsen.

Hon sigur, at Føroya Lærarafelag hevur víst vilja og sagt seg til reiðar at virka við til, at lógin kann setast í gildi stigvíst.

Katrin Dahl Jakobsen hevur hug at fílast á, at so nógv verður tosað um, at lógin er so dýr. Hon hevur hug at spyrja, um tað ger nakað, at vit hava ein dýran fólkaskúla.

Hon er greið yvir, at sjálvsagt skal skúlin ikki kosta órímiliga nógv, men Katrin Dahl Jakobsen vísir á, at tað er mangt annað í samfelagnum, ið kundi verið bíligari.



*Hetta er skomm. Hetta er úrslit av, at ein ikki í sínari tíð fyrireikaði seg, sigur Katrin Dahl Jakobsen um støðuna í fólkaskúlanum*

# Tjóðveldisflokkurin tók ikki undir við nýggju lógini

*Tjóðveldisflokkinum eigur báðar landsstýrismenninar, ið eru inni í myndini í ósemjuni um fólkaskúlan. Heini O. Heinesen úr Tjóðveldisflokkinum metir ikki, at til ber at liva við núverandi støðu longi afturat, men hann ásannar, at málið er sera fløkt*

DAGFINN OLSEN

Heini O. Heinesen úr Tjóðveldisflokkinum, ið eigur landsstýrismenninar í fíggjarmálum og skúlamálum, metir at talan er um eitt fløkt mál.

Hann viðgongur, at hann ikki er so væl inni í smálutum í málinum, men hann heldur, at ikki ber til at liva við núverandi støðu longi afturat.

Hann heldur tó Høgna Hoydal hava rætt í, at rættast er at halda lønar- og lógarspurning hvør sær.

– Men nú verður streykað upp á eina lóg, sum Tjóðveldisflokkurin ikki tók undir við. Hetta hevur Signar á Brúnni eisini víst á. Men tað eru vit, ið sita við Svarta Per. Betur var, um vit sluppu at gera lógina, so vistu vit, hvat hon kostaði, sigur Heini O. Heinesen.

Heini O. Heinesen heldur, at báðir partar hava ábyrgd í ósemjuni millum Føroya Lærarafelag.

Heini O. Heinesen heldur, at talan er um fløkt mál. Hann leggur tó dent á, at hann metir ikki, at tað er ein góð loysn, at løgtingið leggur uppí, sum tað onkutíð hevur verið gjørt.



*Nú verður streykað uppá eina lóg, sum Tjóðveldisflokkurin ikki tók undir við, men tað eru vit, ið sita við Svarta Per, sigur Heini O. Heinesen*




GSM frá Føroya Tele

...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

Frítíðarhald
Til teirra, sum hava tørv á telefonini í frítíðini, t.v.s. at samrøðurnar eftir kl. 18.00 og sunnudagar eru bíligar. Eisini hevur frítíðarhaldið bíligt stovningar- og mánaðargjald.

| Kostnaður fyri frítíðarhald | |
|---|---|
| Stovning | 300,00 kr. |
| Mánaðargjald | 75,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 4,00 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 0,90 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo